# Yrking

**- Jensen, Nielsen og Poulsen**

UMMÆLI
*Kim Simonsen*

Á Listastevnuni hevur verið høvi at hoyrt yrkjarnar Carl Johan Jensen, Jóannes Nielsen og Tórodd Poulsen lesa egnar yrkingar. Carl Johan legði fyri í Müllersa Pakkhusi. Hann dugir væl at lesa. Tað duga allir á hvør sín hátt, tí er tað altíð best at hoyra yrkjarnar lesa yrkingirnar sum teir vilja hava at vit skulu hoyra tær. Tóroddur er hin stuttligasti. Jóanes hugtakandi kensluborin. Carl Johan kanska hin mest akademiski. Carl Johan er eisini hin torførasti yrkjarin av hesum trimum. Kanska eg eri idiosynkratiskur, men Carl Johansa yrkingar siga mær millum lítið og einki, prosain enn minni. Møguligani er Carl Johan misskyltur sum yrkjari, tað er ein ástøðisligur møguleiki. Eg havi ongantíð sæð hann úttømandi ummæltan ella viðgjørdan. Sjálvur hevur hann ummælt onnur niður og norð, ið ikki júst rekast innan hansara bókmentaáskoðan. Kanska ræðast tey flestu at siga okkurt um Carl Johan, tí hann er fløktur, torgreiddur og trupul sum fáur. Hansara yrkingar eru bæði kronglutar og innvikladar. Eg haldi eisini tær kunnu tykjast pretentiøsar og konstrueraðar. Ein onnur orsøk til at ongin skrivar um CJJ er, at hann altíð kemur fyrst við ummælum av teim sum skriva okkurt. Við sjálvsøgdum myndugleika veit at siga, hvør dugir at skriva og ikki, hvør er hot og not, ið nærum altíð endar sum 10-0 til CJJ (og vinir). Eisini bókmentafrøði og ikki minst bókmentafrøðingar fáa vanligani toyggið.

Um Carl Johan hevur uppdaga tað, veit eg ikki, men tað finnast fleiri fagurfrøðisligar hevdir innan modernaða yrking, ið mangan eru langt frá hvørjum øðrum. Hetta er eisini soleiðis innan fotolist, videoinstallatiónir, konseptlist og t.d. tónlist. Neyðugt er at royna at rúma fleiri hættir í senn.

Carl Johan, Jóanes og Tóroddur umboða júst tríggjar ymiskar fagurfrøðisligar slóðir. Tí er tað helst ikki ein farðbar leið at royna at samanbera hesar.


*Kim Simonsen gevur føroyskum yrkjarum toyggið í ummæli í sambandi við upplestur á Listastevnuni.*

### Ymisk eru ættarlið

Fyri eitt ættalið av yrkjarum, ið komu fram í áttatiárunum í Føroyum gjørdist postmodernisman leiðin. Her finst heimurin bert í brotum. Hann er støkkkendur og menniskjað kann ikki hóma heildir. Postmodernisturin fer tí at skoða seg sjálvan við distansuni. Hann vil skriva, men sansirnir tykjast púra fragmenteraðir. Tað er sum eitt slíkt tíðarskeið í føroyskari yrking byrjaði við Tórodda. Seinni fór Carl Johan eisini at skriva yrkingar. Sum yrkjarar líkjast teir ikki, men teir hava keypt sama tíðaranda (sí annars grein í Vaðanum 2002 eftir undirritaða). Ættarliðið áðrenn var øðrvísi. Her hugsi eg t.d. um Róa, Kára P., W. Heinesen, men eisini um Alexandur Kristiansen og Jóanes Nielsen. Serliga Jóanes hevur okkurt Suðuramerikanskt, ið hann sjálvur hevur blanda við politiskari tilvitan. Jóanes sær heimin frá Føroyum við gerandisdaginum sum baksýni og við einum brillum, ið vevja henda føroyska veruleika til vakrar yrkingar. Jóanes hevur tak um modernistiskan yrkingasið. Hann minnir av og á um Ivan Malinovski (bæði sum yrkjari og sum intellektuellur). Eg haldi, at tað besta við Jóanesi, er at hann ikki ræðist pathos. Hann elskar pathos, ið innan yrking kann vera bæði vandamikið og gott. Hjá Jóanesi er tað gott, tí hann dugir í sínum hymnum og harmasangum at sigla leysur av brotasjógvum frá sentimentalum og nostalgiskum brasi.

### Havnará og gerandisdagurin

Karmarnir í Müllersa Pakkhúsi, við ljóðið frá Skipasmiðuni í Havn, kól frá likkum hóskaðu væl til Jóanessa upplestur, ið altíð er ein heilsan til Havnina, gerandisdagin, arbeiðandi fjøldina og kend skøld. Meðan hann læs, sá eg eina skipsmastur spakuliga danda uttanfyri vindeyga. Eg hugsi altíð um Pablo Neruda og um César Vallejo, tá eg lesi ella hoyri Jóanes. Bæði tí at hesir vóru góðir, men eisini tí at bæði Neruda og Vallejo, av og á royndu at bjarga heimin við sínum yrkingum, har tær skuldu bróta seg fram og vísa veg fyri alt fólkið.

Jóanes læs kendu yrkingina um William Heinesen. Eina um Magnus Dam Jacobsen, ið vist eitur Havnará syngur um sínar horvnu dreingir. Frá nýggja savninum komu eisini eini tvær góðar. Yrkingin Hugo er deyður, er ein beinleiðis heilsan til »Lítil ljómur við deyða Silvestre Revueltas«, hjá Neruda, m.a her: »Silvestre er deyður, /navnið aldar gjøgnum akrarnar í brekkunum« (Enduryrkt av Karsten Hoydal í savninum »Sólarkringur« í 1982). Og í eini aðrari, ið ljóðar: »Elskaði veri tey sum stilla vekjaran og vita, at lívið ikki hevur eina ávísa meining (_)« (eg havi ikki savnið her, so hetta er frítt frá minninum), síggja vit eina heilsan til Vallejo: »Elskað veri tey, sum seta seg (_)«. Jóanes hevur góðar fyrimyndir. Tað er bert ótrúligt, at hann í blaðgreinum mangan hevur umboða tey bíttastu sjónarmiðini í Føroyum, samstundis sum hann leggur so nógv gott eftir seg av yrkingum.

### Modernisma og glað nihilisma

Bardagin millum modernistisku upplýsingarheimspekina og postmodernismuna, var hin størsti bardagin innan hugvísindi og list í 20 øld. Bardagin heldur á ótarnað í 21 øld. Hetta er tí sjálvur »reyði tráðurin« innan vísindi og mentan í dag.

Danski bókmentafrøðingurin Marianne Stridsen, ið er ein av teim seinastu reinu postmodernaðu intellektuellu í Danmark, tosar í bókini: »Idyllens grænser – På sporet af en kritisk postmodernisme« frá 2003 um at postmodernisman er (var) opinleiki, yvirskot og tolsemi, ið ynskti øllum fremmandum vælkomnum. Hon helt, at tað postmodernaða stóð fyri: »Kompleksitet, delta, uforudsigelighed, det lokale, det »andet«, kaos, ironi, pastiche, overflade, simulacrum, kopi, ornament og fragment« hetta mótvegis innihaldi, heild, djúpum skipanum og essensi. Tóroddur Poulsen hevur øll hesi postmodernaðu eykenni í senn. Lesarin veit ongantíð, hvat hann sigur næst, hann er lokalur (Havnin) og dyrkar ironi, pastiche og formin. Tað er sum um Tóroddur veit (ella heldur seg vita), at alt bert er fragmentir, endurgerð og kopi av einum kopi. So far so good, her kunnu Tóroddfjepparar ikki vera so ósamdir (hetta er ikki ein meting, meiri ein lýsing). Tóroddur er stuttligur og anarkistiskur. Ein fínur upplesari eisini. Fantastiskur show maður á palli. Men tað er, sum ein ummælari tók til í Politiken, okkurt »ugidelig« og »vrengandi« yvir øllum. Í hesum eru Tóroddafjepparar helst ikki samdir. Men hví hetta »speisemi«, og hví skal man skriva soleiðis, tá tað er so nógv álvarsamt og vakurt at viðgerða? Hví »yvirflatu«, »kopi« og »kaos«? Eg haldi ikki, at tað er nakað galið við innihaldi sum so, bert hetta finnir ein form, ið klæðir. Hetta er so tað hetta ættarliðið vildi seta í staðin tilveru- og heimsfatanina hjá klassisku modernismuni. Hetta er ikki bert eitt kjak um Tórodd ella ikki, men um postmodernaða list og um modernismuna, t.v.s. mínar atfinningar stinga nógv djúpri enn til eitt kjak um ironi ella pathos, um Tórodd ella Jóanes.

### Hvar eru tey ungu?

Sjálvandi er gott at hoyra hesar yrkjarar live, men eg sakni okkurt nýtt, okkurt annað og at vit koma víðari í føroyskari yrking. Hesir tríggir eru longu, ella nærkast teim fimti, hvar er ættarliðið eftir hesar? Har er onkur, ið roynir at gera seg galdandi, men ikki veruligani hevur funni seg sjálvan enn. Stuttligt hevði verið at sæð t.d. tey 11, ið vunnu her fyri lisið okkurt. Ella enn betri um mikrofonin varð opnað eitt heilt kvøld á Café natúr t.d., so man kundi njóta eina øl og hoyrt t.d. eini 20-30 av teim 126, ið júst sendu inn. Ella vit gjørdu hetta til eitt fast innslag, at øll kundu lisið okkurt. Hetta saman við tónleiki, tí yrking er veitsla, frøði og gleði. Yrkingin skal skræðast vekk frá øllum sakralum. Tónlistalívið í Føroyum er sera livandi við G Festivali og Prix Føroyum har undirskógurin verður nørdur. Innan yrking er tað sum um fólk skulu skamma seg, tí tey hava vunnið eina virðisløn fyri at yrkja, ella sent eina yrking til eitt blað, tí tempulverjar av egnum miseyðnaðum verkum, fáa ilt fyri bróstið tá onkur annar fær ans fyri yrkingar. At útvarpið lesir vinnandi yrkingarnar er í lagi, men bøtir ikki um hetta í longdini. Eg bíði eftir at okkurt nýtt kemur fram at.



listastevna føroya arts festival

# At tulka menniskja

**The Notebook & The Proof. Belgiskir sjónleikarar í Leikhús Gríma. Leikirnir hjá teim eru um samleika, útlegd og fremmandagerðing – trý stór tema úr 20 øld. Serligani innan modernismuna hava vit sæð hetta viðgjørt**

UMMÆLI
*Kim Simonsen*

Tað er altíð forkunnugt at síggja professionellan sjónleik í Føroyum. Leikirnir »The Notebook« og »The Proof« koma frá sjónleikabólkinum De Onderneming, ið varð stovnaður tá tríggir yrkisbólkar gingu saman í 1997. Hetta hendi í sambandi við altjóða sjónleikadagar Théatres du Monde. De Onderneming merkir »Fyritøkan«. Hesi gera royndir við nýggjum og øðrvísi palli. Sjálvt um hesi fólk eru nýskapandi, so eru tey ótrúliga klassisk. Teirra sjónleikur er skyldur við vanligan modernistiskan leik, ið vit hava sæð síðani 1930ini, hetta er tí ikki longur so nýskapandi, men modernað klassiskt. Hóskvøldið spældu tey hesar leikir í Leikhúsinum hjá Grímu. Í bólkinum eru bert fýra fólk (Günther Lesage, Ryszard Turbiasz, Robby Cleiren og Carly Wys), ið tí hava eina ørgrinnu av leiklutum. Bert við at skifta húgvu ella eitt plagg spæla tey nógvir persónar.

Tekstin til leikirnar tey framførdu hava tey funni í einum tríbindaverki hjá ungarsku Agota Kristof. Hon skrivar um egnar upplivingar úr Ungarn og frá uppreistrinum í 1956. 40 ár eftir hetta í útlegd festi hon hesar hendingar á blað. Við øðrum heimsbardaga sum baksýnið skrivar hon um hvussu tvíburarnir Claus og Lucas yvirlivdu barnaár í krígstíð. Teir halda øgiligar venjingar fyri at venja seg við pínu. Teir búgva hjá ommu síni, ið øll kalla »Heksin«. Mamma teirra hevur sent teir til ommuna (spæld av einum manni!). Í grannalagnum búgva nógv fólk. Vit møta grannagentuni, ið presturin misnýtur kynsligt, áðrenn dreingirnir fáa hann at gjalda pening til hennara familju. Øll brúka hvønn annan. Dreingirnir verða eisini kynsligani brúktir av eini eldri konu. Grannagentan neyðtikin av russiskum soldátum. Omman tekur sær ikki av dreingjunum. Teir gerðast løgnir og vandamiklir. Presturin roynir at læra teir okkurt, men eisini hann er illa fyri. Tá mamman at enda kemur eftir dreinginum, hevði hon eitt barn við. Tá vildu teir ikki við henni. Løtu seinni varð hon sprongd í luftina av eini granat. Hon og barnið vóru jarða uttanfyri. Seinni kom pápin aftur, men hann átti eisini onnur børn. Seinni verður pápin skotin av mammuni, tí hann hevur funni sær eina hjákonu. Beiggin varð eisini skotin og endaði á einum serligum heimi fyri meisladi børn. Mamman inniløst á einari sálarligari deild. Á heiminum fyri børn er drongurin, ið vit halda vera Lucas, sera óndur og fer illani við hinum børnunum. Beiggjarnir gjørdust kenslu- og náðileysir sum børn, og eru ein mynd av neyðini í londum sum Ungarn. Í »The Notebook« møta vit tvíburunum sum smádreingir. Í »The Proof« eru teir vaksnir. Men gjørligt var tó at síggja leikirnir hvør sær. Í »The Proof« er senan lívið í einum eystureuropeiskum landið. Kanska serliga rundan um eitt heim fyri brekaði børn í Ungarn. Einki er fastlagt gjøgnum leikin, enn ikki um tvíburarnir nakrantíð møttust aftur. Um drongurin sjálvur fann uppá beiggja sín. Alt er hult í eini toku av pínu.

Dramaturgisk var hetta ein stravin leikur at hyggja eftir. Hann var so ótúliga intensur. Persónarnir eru nógvir og teksturin fylti øgiligt, og so vardi hetta alt kvøldið, t.v.s. eini 3-4 tímar. Eg var sera móður eftir henda umgang av sjónleiki. Upprunaliga eru hetta tríggir leikir. Øll triologiin er ein stór leitan eftir samanhangi, samleika og eini søgu, tí søgugongdini broytist til seinastu løtu. Dialogurin er løgin, mest sum bert einarøður og viðmerkingar – nærum eingin tosar vanligani. Fremmandagerðingin er í spælinum. Tvíburin Lucas leitar eftir horvna beiggjanum Claus, men mynduleikarnir staðfesta at hann sjálvur hevur skrivað alt, ið hann sigur beiggin hevur skrivað. Leikurin snýr seg um søgu og um hvat er falsan? Hvør hevur rætt? Karmurin handan alt er heimspolitiskur. Kenslan av nýggjari sentraleuropeiskari søgu, útlegd, av jarntjaldið, hópdrápi, kríggi. Á senuni er alt hult í lygn og tøgn. Spurningarnir fylkjast sum gátur. Hvør er hvør? Hvat er eitt menniskja. Kunnu vit tulka menniskja?


*Belgiskur yrkisleikur var á Meiarínum í sambandi við Listastevnuna.*

**Forlegg:** Agota kristof
**Gjørt til leik:** De Onderneming: Ryszard Turbiasz, Günter Lesage, Robby Cleiren, Carly Wijs.
**Sena:** Stef Stessel
**Tøkni:** Richard Kerkhofs
**Búnar:** Charlotte Willems
**Longd:** Uml. 4 tímar.

## Yrking

heystið er
líkasælan
í eygunum
á læandi ungdómum

kátar krákur
og órudd
sum flákrar í stikum

millum ár og dag
liggur eitt heilt lív
við skýferð í ymsum litum
og grønum og gulum grasi

millum ár og dag
leita reikandi rekar
eftir summarfuglinum
við tí rætta litinum

millum ár og dag
har várið ongantíð nam heystið
hómast eldri og nýggjari gravir
við grønum og gulum grasi

**Sólrún Michelsen**

## Yrking

Aldan
skóleys
møtir tær
og iljunum

bløðini fúka
Eva er nakin
krúnan á verkinum

eg gangi heim
sjálvt morgunin er vaknaður
bløðini skriva

hetta er mítt blað og likam
skommin úr garði
leyp har tað var lægst
og datt um tann mista tráðin

**Theodor Eli Dam Olsen**